# Ingeborg Vinther góðar vónir um søguliga semju

**Í gjár byrjaðu avgerandi samráðingarnar ímillum arbeiðarafeløgini og Arbeiðsgevararnar. Tá ið Ingeborg Vinther fór á fund, hevði hon heilt góðar vónir um at tað fór at eydnast at finna semju við arbeiðsgevararnar, uttan at senda boð eftir semingsmonnunum**

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo



*Ingeborg Vinther hevði góðar vónir, tá ið hon fór til avgerandi samráðingar í gjáramorgunin. Her er hon avmyndað á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðarafeag fríggjadagin. Vinstrumegin situr Sunrid Vang, fakfelagsumboð á Tvøroyri*

– Eg havi rættiliga góðar vónir um at vit finna eina semju.

Tað segði Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, áðrenn hon fór á avgerandi fundin ímillum arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnir um ein nýggjan sáttmála.

Í gjáramorgunin byrjaðu avgerðandi samráðingarnar ímillum Arbeiðarafeløgini og Arbeiðsgevarafelagið um ein nýggjan sáttmála.

Sáttmálin gekk út á midnátt í gjárkvøldið, mánakvøldið og tá ið samráðingarnar vórðu tiknar upp í gjáramorgunin, skuldi samráðast út í eitt, til semja var funnin, ella til partarnir máttu ásanna, at tað varð neyðugt at boðsenda semingsmanninum.

Semingsmaðurin hevur so heimild til at útseta eitt verkfall í eina viku og tað plagar hann at gera.

### Kanska óneyðugt við semingsmanni

Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag fríggjadagin, upplýsti Ingeborg Vinther, at samráðingarnar ganga so mikið væl, at hon hevði rættiliga góðar vónir um, at partarnir skuldi finna eina semju.

Ingeborg Vinther segði, at hon hevði enntá vónir um at partarnir kundu finna semju, uttan at senda boð eftir semingsmanninum.

– Hevði tað eydnast, hevði tað verið søguligt, men eg havi góðar vónir fyri tí, segði hon.

Undir øllum umstøðum helt hon at heilt góðar vónir eru fyri at tað slepst undan arbeiðssteðgi hesuferð, og tað er ikki ofta, at hon er so bjartskygd, tá ið farið verður undir endaligu samráðingarnar.

### Heilt annar vilji

Men tað skilst eisini á Ingeborg, at hesuferð fóru partarnir undir samráðingar við einum veruligum vilja til at samráðast og at fáa eitt úrslit burturúr og einum heilt øðrum hugburði, enn vanligt hevur verið.

Ingeborg Vinther fortaldi fundarfólkinum, at tað er langt síðani, at partarnir eru farnir undir samráðingarnar í so góðum og positivum anda, sum hesuferð.

Tað skilst eisini á fundarfólkinum á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag, at krøvini frá arbeiðarafeløgunum eru minni enn tey plaga at vera og at feløgini hesuferð raðfesta gjøldtil eftirlønir og aðrar sosialar veitingar hægri enn beinleiðis lønarhækkingar.

Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, boða eisini arbeiðsgevararnir frá, at eftir teirra tykki hava samráðingarnar gingið so mikið væl, at eisini teir hava vónir um, at tað fer at eydnast at finna semju uttan at senda boð eftir semingsmonnunum

Men tá ið lesarin úti á bygd í Føroyum, fær hetta blaðið upp í hendur, er tað kanska longu greitt, hvussu úrslitið verður og um tað var rætt at hava so góðar vónir.



*Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag fekk fundarfólkið at vita, at royndirnar at bøta um ALS gingu ikki væl*



## Grind í Fuglafirði

Tað er um at vera tann tíðin, har drápini verða hildin ymsa staðni kring landið, og mánadagin kundu fuglfirðingar so fegnast um, at teir nú kunnu fáa sær eitt kók.

Grindin var góðar 100 hvalir, men við evstamark okkara var ikki greitt, hvussu nógv skinn talan var um.

Myndina hevur Kjartan Madsen tikið.

# Gekk illa at bøta um ALS

AÐALFUNDUR Í FØROYA ARBEIÐARAFELAG
Àki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Í Føroya Arbeiðarafelag eru tey ikki serliga vælnøgd við Als-skipanina. Men á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðarafelag fríggjadagin upplýsti Ingeborg Vinther, forkvinna at tað hevði gingið sera strilti at broyta skipanina til frama fyri arbeiðsfólkið.

Ein bólkur hevur arbeitt við at endurskoða ALS og í tí sambandinum hava arbeiðarafeløgini gjørt vart við nógv, ið eftir teirra tykki, haltar á ALS-skipanini.

Serliga hava tey roynt at fáa fiskavirkisskipanina broytta, so hon tænir arbeiðsfólkinum betri.

– Tað seinasta, tað eydnaðist at fáa burturúr, var, at nú skal útgjaldsgrundarlagið endurskoðast á hvørjum ári, so um inntøkan hækkar, hækkar útgjaldið, segði IngeborgVinther.

Tey royndu eisini at fáa semju um, at fólk í fiskavirkisskipanini skulu ongantíð fara niður um 50% av tí hægsta útgjaldinum.Men tað fekst ikki undirtøka fyri tí í arbeiðsbólkinum.

– Vit royndu so at fáa útgjaldið úr ALS úr 70 prosentum og upp í 80% av eini tímaløn. Men Fyri at góðtaka tað, vórðu treytirnar so harðar, at tað loysti seg ikki, tí tað hevðI gjørt skipanina verri fyri arbeiðsfólkið, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at ein treyt var, at tíðin, ein kundi fáa ALS-stuðul, skuldi niður í helvt.

Tað vildu umboðini hjá arbeiðarafeløgunum ikki góðtaka

– Í dag er skipanin, at tú kanst fáa útgjald í 798 dagar í einum trý ára skeiði, og tað vilja vit ikki broyta, segði Ingeborg Vinther.

Men hon legði afturat, at teyhava ikki heilt givið upp at royna at fáa fleiri broytingar við í ALS.